# Álopsspælararnir eru ógvuliga hvassir

**Hjálparvenjarin á landsliðnum heldur, at báðir álopsspælararnir, sum skulu við landsliðnum til Ísrael, og sum vóru í Runavík mánakvøldið, staðfestu mánakvøldið, at teir eru sera væl fyri**



*Við trimum málum í Runavík hevur Jónhard Fredriksberg av álvara viðmælt sína støðu, tá Henrik Larsen fyri seinastu ferð skal gera av, hvussu føroyska fótbóltslandsliðið skal síggja út*

Mynd: Álvur Haraldsen

LANDSLIÐSÁLOPIÐ
*Jóannes Hansen*

Í gjár varð her á síðunum víst á tað óhepna í, at fleiri av teimum, sum í næstu viku skulu til Ísraels at spæla seinasta dystin í hesi HM undankappingini, ikki kunnu vera í dyggari dystarvenjing.

Mánakvøldið vóru tó fínir glottar at síggja, tá ið NSÍ og Skála undirhildu og skoraðu trý mál í part.

Millum mest eyðsýndu spælararnar á vøllinum vóru Christian Høgni Jacobsen hjá NSÍ og Jónhard Frederiksberg hjá Skála. Tann fyrri hevði fleiri góðar royndir, hann var stinnur í samanspælinum, og hann skoraði í síðsta minutti málið, sum bar eitt stig við sær til NSÍ.

Í hinum endanum talaðu tølini. Jónhard Frederiksberg skoraði tríggjar ferðir, hann flutti seg nógv, og hvørja ferð hann fekk bóltin kendist vandi at vera á ferð.

Jógvan Martin Olsen var í Runavík, og varamaðurin hjá Henrik Larsen var stak væl nøgdur við tað, sum álopsspælararnir vístu:

- Eg haldi ikki, at Christian Høgni hevur verið so væl fyri, síðani hann varð illa skaddur í knænum og noyddist at binda frið í eitt ár, sum hann er nú. Hann er tryggur og skilagóður, og hann tekur rættar avgerðir. Tað sær gott út, staðfestir Jógvan Martin, sum sjálvandi eisini er væl nøgdur við Jónhard Frederiksberg:

- Hann hevur ment seg nógv seinastu mánaðirnar. Hann er stinnari í at móttaka bóltin og at varðveita hann, og tað tykist sum um, at hann ikki er so strongdur, sum hann kanska áður hevur sæð út at verið. Hann megnar at varðveita bóltin, tá ið hann er kroystur, og tað er sera góð dygd hjá føroyskum álopsspælara, heldur Jógvan Martin Olsen.

*Verða tað teir báðir, sum fara at mynda álopið í Ísrael?*

- Andrew av Fløtum hevur nógvu tær seinastu vikurnar víst, at hann er ógvuliga væl fyri, so tað er kapping um fremstu plássini, hóast við sjálvandi høvdu viljað havt Toda í fullgóðari venjing. Um vit fara at spæla við einum ella tveimum heilt har frammi er avgerð ikki tikin um enn. Men tað sigur seg sjálvt, at tað eigur at verða hugsað um at geva pláss fyri spælarum, sum tykjast at vera so væl fyri, sum teir báðir álopsspælararnir mánakvøldið vístu, at teir eru.

Jónhard Frederiksberg heldur, at tað gekk rímuliga væl hjá honum móti NSÍ:

- Tá ið man fær trý mál skal man ikki láta illa at. Men tað vóru viðspælararnir, sum góvu mær møguleikarnar. Eg havi arbeitt nógv við at betra móttøkurnar og fyri at gerast betri at varðveita bóltin, og eg kenni tað soleiðis, at venjingin og medvitið um hetta saman við alt størri royndunum hava borið við sær, at tað gongur rætta vegin, heldur Jónhard Frederiksberg.

*Roknar tú við at vera millum teir fyrsu ellivu í Ísrael?*

- Tað avgerðina eigur venjarin. Vit eru fleiri, sum kappast um plássini. Ein teirra er Christian Høgni, og eg haldi, at hann er væl fyri. Hann spældi væl í kvøld, og at hann higartil hevur skorað trettan mál sigur, at hann er vandamikil, staðfestir Jónhard Frederiksberg, sum við hattrikkinum mánakvøldið hevur skorað trettan ferðir higartil í landskappingini.

# VB kvinnuhondbóltur og Shell skrivað undir sáttmála

**Fríggjadagin skrivaði VB kvinuhondbóltur og Shell undir 2 ára sáttmála, har Shell er høvuðsstuðul hjá hondbóltskvinnunu m hjá VB**

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Eydis Kjærbo, VB kvinnuhondbóltur, og Erling í Liða, marknaðarleiðari hjá Shell, skriva undir stuðulssáttmála fríggjadagin. Á myndini er eisini Tom V. Magnussen, Sp/f Oyri, ið er Shell umboð í Vági og leikarar og venjari hjá VB kvinnum*

Mynd: D. Olsen

Fríggjadagin skrivaðu umboð fyri Shell og umboð fyri hondbóltsdeildina hjá VB undir sáttmála. Talan er um sáttmála, har Shell er høvuðsstuðul hjá VB hondbólti. Hetta er tvey ára sáttmáli, og er hann millum VB, Shell og Sp/F Oyri, sum er Shellumboð í Vági. Við hesum verður farið undir 3. árið, har Shell er høvuðsstuðul hjá VB hondbólti. Og Erling í Liða, marknaðarleiðari hjá Shell duldi ikki, at Shell fegnast um at kunna stuðla fremsta kvinnuliðnum hjá VB í hondbólti, tí hesar hava sum teim flestu kunnugt sera góð úrslit at vísa á.

Eisini fegnaðist hann um, at Shell kemur út um miðstaðarøkið og er við til at stuðla í útjaðaranum, og hann vónaðu tað besta framyvir, og at útslitini framvegis gerast millum tey bestu.

Og VB-venjarin og hini VB umboðini mettu kvinnuliðið at vera væl fyri. Stamman er hin sama, men tó ber eisini til at siga, at talan er um nýtt lið, nógvar yngri kreftir eru komnar framat.

## FAKTA UM DYSTIN

**NSÍ-SKÁLA 3-3 (1-2)**
1-0: Páll M. Joensen 14.
1-1: Jónhard Frederiksberg 23.
1-2: Jónhard Frederiksberg 25.
2-2: Viggo Johannesen 58.
2-3: Jónhard Frederiksberg 88.
3-3: Christian Høgni Jacobsen 90.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen, Jónstein Petersen - Páll M. Joensen, Dánial Hansen (Sjúrður Jacobsen, 68.), Jústinus R. Hansen, Andy Olsen (Einar Hansen, 81.) - Christian Høgni Jacobsen, Helgi L. Petersen
**GK:** Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Helgi L. Petersen
**Skála:** Eugen Voda - Pætur Dam Jacobsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Iulian Florescu - Rói Jacobsen (Bárður Danielsen, 63.), Pauli G. Hansen, Nenad Zivanovic, Hanus Thorleifsson - Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen (Alexandur Johansen, 89.)
**GK:** Bogi Gregersen, Milic Curcic

## formuladeildin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 24 | 13 - 8 - 3 | 34 | 15 | 19 | 47 |
| 2 Skála | 24 | 12 - 10 - 2 | 52 | 27 | 25 | 46 |
| 3 HB | 24 | 14 - 4 - 6 | 62 | 31 | 31 | 46 |
| 4 NSÍ | 24 | 11 - 8 - 5 | 45 | 36 | 9 | 41 |
| 5 EB/Streymur | 24 | 10 - 9 - 5 | 42 | 32 | 10 | 39 |
| 6 ÍF | 24 | 6 - 7 - 11 | 30 | 52 | -22 | 25 |
| 7 KÍ | 24 | 7 - 3 - 14 | 34 | 44 | -10 | 24 |
| 8 GÍ | 24 | 6 - 4 - 14 | 31 | 49 | -18 | 22 |
| 9 VB | 24 | 5 - 5 - 14 | 31 | 53 | -22 | 20 |
| 10 TB | 24 | 4 - 6 - 14 | 25 | 47 | -22 | 18 |

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 14 |
| Sorin Anghel | EB/S | 13 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 13 |
| Bogi Gregersen | Skála | 12 |
| Hans á Lag | HB | 11 |
| Allan Mørkøre | B36 | 10 |
| Sámal Joensen | GÍ | 10 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 9 |
| Dan Djurhuus | VB | 9 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 8 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 7 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Óli Johannesen | TB | 7 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 6 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 6 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 6 |
| Páll M. Joensen | NSÍ | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |
| Fróði Benjaminsen | B36 | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Jákup á Borg | HB | 5 |
| David Ahmed (Silla) | ÍF | 5 |
| Atli Danielsen | KÍ | 5 |
| Andy Olsen | NSÍ | 5 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |